


www.oljan.fo

**Jan Müller** 23 - 01 - 2012

# ES-bann kann senda oljuprísin upp

Danske Bank væntar, at prísurin á olju og benzini fer at hækka nógv, nú uttanríkisráðharrarnir í ES-londunum hava gjørt av at steðga øllum oljukeypi úr Iran. Arne Lohmann Rasmussen, sum er ráevnagreinari hjá bankanum, sigur, at handilsbannið og størri eftirspurningur eftir olju fara helst at trýsta prísin upp á millum 120 og 125 dollarar fyri tunnuna. Danske Bank væntar, at eitt fellandi dollaravirði fer at taka tað ovasta av príshækkingini, men at hon kortini verður stór. Í løtuni liggur prísurin á blýfríum 95-benzini um 12,75 krónur í Danmark, men Arne Lohmann Rasmussen sigur, at hann kann lættliga hækka millum 50 oyru og eina krónu. Oljubannið hjá ES-londunum kemur ikki í gildi fyrr enn tann 1. juli, men frá í dag av kunnu londini ikki gera sáttmálar um at keypa iranska olju. Umframt at steðga øllum keypi hava ES-londini eisini gjørt av at nokta limalondunum at selja iranum oljutøkni. Arne Lohmann Rasmussen sigur, at hóast handilsbannið hjá ES ikki kemur í gildi fyrr enn í summar, er oljuprísurin hækkaður ta seinastu tíðina. Orsøkin er óvissan, um iranar fara at steingja Hoemuz-sundið, sum teir hava hótt við, ella um teir fara at slaka. Ein annar spurningur er, hvat hini oljuframleiðaralondini fara at gera, tá ES gevst at keypa olju frá Iran, og hvat fara USA og Kina at gera. -Óvissa í sambandi við trygdarspurningar er tað, sum ávirkar oljuprísin mest, sigur ráevnagreinarin hjá Danske Bank.